# Ársfrágreiðing 2022 hjá javnstøðunevndini

# Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit ... 2
Samandráttur ... 3
1. Javnstøðunevndin 2022 ... 4
2. Eftirlit og undantaksloyvi ... 5
Almennar nevndir og ráð ... 5
Undantaksloyvi ... 6
Ein umbøn um undantak frá Fiskimálaráðnum ... 7
Tríggjar umbønir um undantak frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum ... 7
Brot á javnstøðulógina ísv. setan av nýggjum formanni í Kringvarpsstýrið ... 7
3. Kærur um mismun vegna kyn ... 8
Kæra um starvsflyting eftir barnsburð og farloyvi ... 8
Kæra sbrt. løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki ... 8
4. Fyrispurningar, áheitanir og líknandi ... 8
Starvslýsing eftir ávísum kyni ... 9
Rættur hjá barni at hava samband við pápa ... 9
Fyrispurningur um klædnareglur í fólkaskúlanum ... 9
5. Leiðbeining um klaguviðgerð hjá javnstøðunevndini ... 9
6. Kunnandi virksemi ... 10
Hugburðs- og atburðskanning um javnstøðu í Føroyum ... 10
Átøk á sosialum miðlum ... 10
Fólkatingsval og løgtingsval ... 11
7. Virkisøki og arbeiðssetningur ... 11
8. Nevndarlimirnir ... 11
9. Játtan ... 12

# Samandráttur

Javnstøðunevndin hevur í 2022 arbeitt við hesum málum:

- luttikið í kjakinum um javnstøðu og javnstøðupolitikk
- havt eftirlit við, at javnstøðulógin verður hildin
- viðgjørt kærur um mismun vegna kyn
- avgreitt fyrispurningar um javnstøðu frá borgarum, feløgum og stovnum
- skipað fyri og luttikið á tiltøkum og kunnandi virksemi um javnstøðu
- tikið stig til javnstøðukanning
- viðgjørt uppskot um leiðbeining um klaguviðgerð hjá javnstøðunevndini

Samanumtikið kann sigast um 2022:

- Javnstøðunevndin hevur viðgjørt fýra umbønir um undantak í mun til ójavna kynsumboðan við setan av almennum nevndum og játtað øllum fýra umbønum.
- Fólkatingsval og løgtingsval hava sett sín dám á nevndararbeiðið undir seinnu ársválvu
- Javnstøðunevndin hevur átalað landsstýrismannin í mentamálum fyri brot á javnstøðulógina
- Javnstøðunevndin hevur tikið stig til og fíggjað nýggja hugburðskanning um javnstøðu í samstarvi við Demokratia, Almannamálaráðið og Fróðskaparsetrið
- Javnstøðunevndin hevur sett nýggjan samskipara og skrivara í starv

Í fíggjarlógini fyri 2019 varð samtykt at leggja játtanirnar fyri javnstøðunevndina og Demokratia saman í eina høvuðskonto og at økja samlaðu játtanina við 250.000 kr., soleiðis at játtanin samanlagt varð 983.000 kr. Á fíggjarlógini fyri 2020 og 2021 var tí nóg mikið av peningi til, at nevndirnar saman kundu seta ein samskipara og skrivara fyri báðar nevndirnar í 30 tíma starv. Nevndin sendi í 2021 umbøn um hægri játtan til landsstýriskvinnuna í javnstøðumálum. Umbønin varð gingin á møti og við árslok 2021 eydnaðist landsstýriskvinnuni, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, at fáa til høldar 250.000 kr. afturat til javnstøðumál. Harvið gjørdist tað loksins møguligt, at fáa akademiskan skrivara og samskipara at arbeiða fulla tíð á Javnstøðuskrivstovuni, sum húsast í Almannamálaráðnum.

Við hesum verður ársfrágreiðingin hjá javnstøðunevndini fyri 2022 løgd fram.

Til ber at venda sær til skrivstovuna við at ringja 734064 ella senda teldubræv til javnstoda@javnstoda.fo.

Mai Laksáfoss Simonsen

*forkvinna*

# 1. Javnstøðunevndin 2022

Í javnstøðunevndini fyri tingsetuna 2019-2023 sita:

- Mai Laksáfoss Simonsen, forkvinna, umboð fyri Føroya landsstýri
- Annfinnur Garðalíð, umboð fyri løntakarar
- Niels Winther, umboð fyri arbeiðsgevarar
- Hedvig Johansdóttir, umboð fyri skúla-, heilsu- og almannamál
- Helena Fríðheim, umboð fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya

Varaumboð eru:

- Jón Harald Poulsen, næstformaður, umboð fyri Føroya landsstýri
- Mary Antonsdóttir, varaumboð fyri løntakarar
- Jórun Gardar, varaumboð fyri arbeiðsgevarar
- Leif Olsen, varaumboð fyri skúla-, heilsu- og almannamál
- Annetta Saltá, varaumboð fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya

Longu í 2020 boðaðu Annfinnur Garðalíð og Niels Winther frá, at teir tóku farloyvi í óásetta tíð, og í 2021 valdi eisini Hedvig Johansdóttir at fara í farloyvi restina av valskeiðinum. Miðskeiðis í 2022 kom Annfinnur Garðalíð, sum síðani 2020 hevði verðið avloystur av varaumboðnum Mary Antonsdóttir, aftur úr farloyvi. Um sama mundið í 2022 boðaði Hedvig Johansdóttir frá, at hon tók seg endaliga úr nevndini. Sostatt eru tað varaumboðini fyri Niels Winther og Hedvig Jóhansdóttir, sum sita í nevndini; Jórun Gardar fyri Niels Winther, umboðandi arbeiðsgevarar, og Leif Olsen fyri Hedvig Johansdóttir umboðandi almannamál.

Tað var Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, táverandi landsstýriskvinna í almannamálum, sum eisini var landsstýriskvinna í javnstøðumálum, ið setti sitandi javnstøðunevndina.

Fremsta uppgávan hjá javnstøðunevndini er, at hava eftirlit við, at javnstøðulógin verður hildin. Endamálið við javnstøðulógini er, at beina burtur allan mismun vegna kyn. Javnstøðunevndin skal harafturat ráðgeva myndugleikum, stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum, umframt at gera tilmæli í javnstøðumálum.

Javnstøðunevndin hevur sambært javnstøðulógini uppgávuna at viðgera klagur frá fólki um mismun vegna kyn.

Harumframt er javnstøðunevndin kærumyndugleiki í lóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki.

Undanfarna landsstýri, við Eyðgunn Samulesen sum landsstýriskvinnu í javnstøðumálum, orðaði ein javnstøðupolitik og virkisætlan fyri javnstøðu. Í hesi virkisætlan eru 27 átøk, sum skulu fremjast frá 2018 – 2022. Sitandi landsstýrið hevur ikki sett sær beinleiðis mál á javnstøðuøkinum, men javnstøðunevndin arbeiðir við egnum málum umframt at arbeiða víðari við virkisætlanini hjá undanfarna landsstýri.

**Av teimum 27 átøkunum er javnstøðunevndin ábyrgdari fyri hesum seks:**

- Átak 1: Økja um tilvitan um kynsleiklutir og javnstøðu í dagstovnum
- Átak 2: Tilvitan um kynsleiklutir í námsskipanum og námsfrøði- og læraraútbúgvingunum
- Átak 5: Upplýsandi tilfar í almenna rúminum
- Átak 9: Eggja øðrum kyninum at taka ávísar útbúgvingar
- Átak 10: Eggja fleiri gentum at taka STEM-fak
- Átak 11: Kunning um parttíðarstørv í Føroyum

**Harumframt er javnstøðunevndin samstarvspartur í fýra átøkum:**

- Átak 16: Javnstøðupolitikkur á arbeiðsplássum
- Átak 20: Barbershop-tiltak
- Átak 26: Kynssamtáttan
- Átak 27: Javnstøðufrágreiðing

Javnstøðunevndin fer at virka fyri og fylgja við í arbeiðinum at fremja virkisætlanina í síni heild.

Í 2022 setti nevndin sær fyri serliga at arbeiða við:

- Átak 5: Upplýsandi tilfar í almenna rúminum
- Átak 16: Javnstøðupolitikkur á arbeiðsplássum

# 2. Eftirlit og undantaksloyvi

Samb. § 8 í javnstøðulógini skal kynsbýtið í øllum almennum nevndum, ráðum og líknandi vera javnt, og tað er skylda hjá Javnstøðunevndini at fylgja við.

## Almennar nevndir og ráð

Av teimum 145 almennu nevndunum og ráðunum var støðan í 2022[1] hendan býtt á stjórnarráð:

[1] Uppteljingin er gjørd eftir yvirliti hjá Løgmansskrivstovuni, dagført 6. juli 2022

| Stjórnarráð | Nevndarlimir | Menn | % | Kvinnur | % |
|---|---|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 32 | 21 | 65,6 | 11 | 34,4 |
| Almannamálaráðið | 64 | 34 | 53,1 | 30 | 46,9 |
| Fíggjarmálaráðið | 104 | 68 | 65,4 | 36 | 34,6 |
| Fiskimálaráðið | 24 | 19 | 79,2 | 5 | 20,8 |
| Heilsumálaráðið | 69 | 38 | 55,1 | 31 | 44,9 |
| Uttanríkis- og mentamálaráðið | 186 | 106 | 57 | 80 | 43 |
| Umhvørvis- og vinnumálaráðið | 269 | 175 | 65,1 | 94 | 34,9 |

Til samans vóru 748 nevndarlimir, harav *461* menn og *287* kvinnur, ella 61,6% menn og 38,4% kvinnur. Javnasta býtið er í Almannamálaráðnum, sum eisini varar av javnstøðumálum. Ójavnasta býtið er í Fiskimálaráðnum.

Til samanberingar var býtið í hesum nevndum og ráðum í 2021: *465* menn (61,4%) og *292* kvinnur (38,6). Í 2019 var býtið: *472* menn (62,5) og *283* kvinnur (37,5).

Her er einans talan um nevndir og ráð, sum sjálvt fyrisitingarvaldið, ella almenni myndugleikin, útnevnir.

## Undantaksloyvi

Sambært § 8, stk. 2 í javnstøðulógini skal fyrisitingarvaldið søkja javnstøðunevndina um undantaksloyvi, um serligar grundir eru fyri, at nevndir og ráð ikki hava kynsliga javnvág.

- Í 2022 fekk javnstøðunevndin fýra umbønir um undantaksloyvi
- Í 2021 fekk javnstøðunevndin tvær umbønir um undantaksloyvi
- Í 2020 fekk javnstøðunevndin eina umbøn um undantaksloyvi
- Í 2019 fekk javnstøðunevndin tvær umbønir um undantaksloyvi
- Í 2018 fekk javnstøðunevndin fimm umbønir um undantaksloyvi

Í fýra førum fekk javnstøðunevndin umbøn um undantak í 2022. Sambært ásetingini í grein 8, stk. 2 kann javnstøðunevndin, tá serligar grundir eru fyri tí, geva undantaksloyvi í hvørjum einstøkum føri ella fyri eina yrkisgrein sær.

## Ein umbøn um undantak frá Fiskimálaráðnum

Tann 5. september vendi Fiskimálaráðið sær til javnstøðunevndina við umbøn um undantak í sambandi við val av Fiskivinnuráðnum. Tá viðkomandi feløg, sum ráðslimir skulu umboða, hava stóra yvirvág av øðrum kyninum, er talan um serliga grund fyri, at kynsumboðanin ikki er jøvn. Í hesum førinum eru ov fáar kvinnur umboðaðar. Tí samtykti javnstøðunevndin at játta undantaksloyvið.

## Tríggjar umbønir um undantak frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum

Tann 2. november fekk javnstøðunevndin eina umbøn um undantaksloyvi í sambandi við, at Uttanríkis- og mentamálaráðið, eftir tilmæli frá biskupi, hevði gjørt av, at seta eitt serprestaembæti sum diakonprestur og eitt sum studentaprestur. Uttanríkis- og mentamálaráðið fekk undantaksloyvi í hesum førinum.

Tann 21. november fekk javnstøðunevndin tvær umbønir um undantak frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum í sambandi við, at tvey samstarvsráð vóru sett, sum ikki luku treytirnar um javnt kynsbýti. Talan var um samstarvsráðini fyri námsfrøðiútbúgvingina og sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingina hjá Fróðskaparsetri Føroya. Í báðum førunum var talan um ráð, ið hava stóra yvirvág av kvinnum. Javnstøðunevndin gekk báðum umbønum á møti og mælti harumframt til at broyta viðkomandi kunngerð, soleiðis at eitt av hvørjum kyni verður tilnevnt, heldur enn at limir verða beinleiðis valdir. Hetta fyri at økja um líkindini fyri javnari kynsumboðan í ráðunum.

## Brot á javnstøðulógina ísv. setan av nýggjum formanni í Kringvarpsstýrið

Í juli mánaði varð javnstøðunevndin varug við, at Jenis av Rana, landsstýrismaður í mentamálum, valdi at seta ein mann sum nýtt forfólk í Kringvarpsstýrið. Við setanini fór kynsbýtið í stýrinum frá at vera tríggjar kvinnur og fýra menn til at vera tvær kvinnur og fimm menn. Sostatt var avgerðin hjá landsstýrismanninum, at seta ein formann heldur enn eina forkvinnu, í stríð við ásetingarnar í javnstøðulógini um, at bæði kyn skulu vera javnt umboðað í almennum nevndum og ráðum. Javnstøðunevndin gav Jenisi av Rana átalu fyri lógarbrotið og álegði landsstýrismanninum at rætta lógarbrotið. Eftir at Bárður á Steig Nielsen, løgmaður, bað um frágreiðing frá Jenisi av Rana um, hvussu hann fór at tryggja, at nevndu ásetingar í javnstøðulógini í framtíðini fóru at verða fylgdar, sendi løgmansskrivstovan javnstøðunevndini frágreiðingina hjá Jenisi av Rana til ummælis. Í niðurstøðu sínari gjørdi javnstøðunevndin greitt, at talan var um brot á nevndu ásetingar. Eftir at Jenis av Rana rættaði kynsbýtið í stýrinum við at skifta starvsfólkaumboðið, sum var maður, út við eina kvinnu, metti javnstøðunevndin, at landsstýrismaðurin hevði fylgt niðurstøðu sínari.

# 3. Kærur um mismun vegna kyn

### Kæra um starvsflyting eftir barnsburð og farloyvi

Javnstøðunevndin fekk Í 2021 umvegis fakfelag kæru frá kvinnu, sum eftir barnsburðarfarloyvið, í staðin fyri at koma aftur til starvið, sum hon hevði havt frammanundan, varð sett í annað starv við lægri starvsaldri og løn. Sambært §3 í javnstøðulógini er ikki er loyvt at gera mismun á løntakara vegna kyn, og er hesin mismunur galdandi við starvsseting, uppsøgn, starvsmeting, lønarflokking, starvsflyting, starvsuppflyting, farloyvi, arbeiðsumstøður og framíhjárættindi. Í niðurstøðu sínari tann 6. apríl staðfesti javnstøðunevndin, at arbeiðsgevarin hevði ikki prógvað, at uppsøgnin ikki var grundað á barsilin. Javnstøðunevndin kom til ta niðurstøðu, at talan var um brot á grein 6, stk. 5 í javnstøðulógini, og álegði javnstøðunevndin arbeiðsgevaranum at gjalda kvinnuni endurgjald svarandi til løn í 25 vikur, sum við eftirløn svaraði til áleið 190.000kr. Fakfelagið metti, at upphæddin skuldi ikki skattast, meðan TAKS metti, at tað skuldi hon. TAKS heitti síðani á javnstøðunevndina at taka støðu til spurningin. Tann 26. juli staðfesti javnstøðunevndin, at talan var um persónligt vanbýti heldur enn fíggjarligt vanbýti, og sostatt varð staðfest, at endurgjaldið skuldi ikki roknast sum skattskyldug inntøka.

### Kæra sbrt. løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki

Umframt at virkisøkið hjá javnstøðunevndini er lógarfest við løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn, er javnstøðunevndin eisini kærumyndugleiki í løgtingslóg nr. 63 um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki. Í 2020 fekk javnstøðunevndin á fyrsta sinni eina kæru til viðgerðar í hesum sambandi. Kæran kom umvegis Uttanríkis- og mentamálaráðið, sum heitti á javnstøðunevndina um at viðgera mál um sjúkrarøktarfrøðilesandi, sum kendi seg vera fyri mismuni vegna niðursetta hoyrn. Fróðskaparsetur Føroya metti, at tað var ikki gjørligt hjá tí lesandi at standa tann kliniska partin av útbúgvingini orsakað av niðursettari hoyrn, og tískil varð noktað tí lesandi at fara upp til próvtøku. Javnstøðunevndin gav viðhald í kæruni og metti, at talan var um brot á § 1 í lóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki. Javnstøðunevndin frætti eftirfylgjandi ikki um endaligu niðurstøðuna í málinum, hóast rykt varð eftir svari fleiri ferðir. Men á vári í 2022 varð javnstøðunevndin loksins kunnað um, at málið var liðugt í oktober mánaði í 2021. Í endaligu niðurstøðu sínari ógildaði Uttanríkis- og mentamálaráðið avgerðina hjá Fróðskaparsetri Føroya at nokta tí lesandi at fara upp í próvtøku, men gjørdi tínæst ikki meir við málið.

# 4. Fyrispurningar, áheitanir og líknandi

Umframt kærur frá borgarum um mismun vegna kyn, kann eisini vera talan um fyrispurningar, har borgarar o.o. spyrja ella gera vart við møguligan mismun vegna kyn.

### Starvslýsing eftir ávísum kyni

Í desember mánaði varð javnstøðunevndin varug við starvslýsing hjá Svimjihøllini í Gundadali, sum søkti eftir mannligum lívbjargara. Hóast nevndin skilti, at tað er eyðsæð, at kyn er viðkomandi, tá starvsfólk í svimjihøllini skulu kunna røkja uppgávur í skiftingarrúmunum hjá kvinnum og monnum, so minti javnstøðunevndin svimjihøllina á ásetingarnar í grein § 2, stk. 3 í javnstøðulógini, sum ásetir, at ikki er loyvt arbeiðsgevara at lýsa eftir fólki til arbeiðis, har tað á nakran hátt bendir á, at annað kynið hevur fyrimun, men at tað er møguligt hjá arbeiðsgevara at søkja um undantak. Nevndin fekk svar frá Svimjihøllini í Gundadali, sum greiddi frá umstøðunum við skiftirúmunum. Javnstøðunevndin bað Svimjihøllina í Gundadali rætta starvslýsingina skjótast gjørligt. Nýggi leiðarin í svimjihøllini kunnaði javnstøðunevndina um, at hann fór at biðja Snarskivuna rætta starvslýsingina skjótast gjørligt. Javnstøðunevndin gjørdi ikki meira við málið.

### Rættur hjá barni at hava samband við pápa

Í desember 2022 fekk javnstøðunevndin fyrispurning vegna ein pápa, sum segði seg ikki sleppa at síggja dóttur sína. Skrivstovan var nógv í sambandi við umboð fyri pápan. Javnstøðunevndin viðgjørdi fyrispurningin og kom til ta niðurstøðu, at nevndin hevur ikki heimild til at seta seg inn í familjuviðurskifti til fulnar og vísti til Familjufyrisitingina.

### Fyrispurningur um klædnareglur í fólkaskúlanum

Í juni mánaði fekk javnstøðunevndin fyrispurning um mismun vegna kyn í fólkaskúlanum í sambandi við klædnanormar hjá børnum. Fyrispurningurin snúði seg ítøkiliga um, at ein genta hevði fingið at vita frá lærara og skúlastjórn, at hon skuldi ikki ganga ber um miðjuna, tí hetta distraheraði læraran, sum var maður. Forkvinnan og skrivarin fingu á fundi við Lærarafelagið staðfest, at í slíkum tilburðum hevur lærarin fyri neyðini at søkja sær hjálp, og at Undirvísingarstýrið átti at tikið málið upp. Nevndin bað Undirvísingarstýrið um fund, men fekk onki svar.

## 5. Leiðbeining um klaguviðgerð hjá javnstøðunevndini

Tann 7. februar 2022 fekk javnstøðunevndin uppskot til leiðbeining um viðgerð av klagum hjá javnstøðunevndini frá Almannamálaráðnum til hoyringar. Eftir at hava viðgjørt uppskotið á nevndarfundi, sendi javnstøðunevndin viðmerkingar sínar til hoyringsskrivið. Tann 1. november 2022 fekk javnstøðunevndin enn einaferð uppskot til leiðbeining til viðgerðar, og somuleiðis vórðu viðmerkingar sendar Almannamálaráðnum. Í januar 2023 varð endaliga leiðbeiningin undirskrivað av nýggju landsstýriskvinnuni í almannamálum og sett í gildi.

Við leiðbeiningini kemur málsliga broytingin, at *kæra* verður til *klaga*. Sostatt verður orðið *klaguviðgerð* nýtt framyvir .

Leiðbeiningin er tøk á lógarsavninum og kann lesast her.

# 6. Kunnandi virksemi

## Hugburðs- og atburðskanning um javnstøðu í Føroyum

Í 2021 tók javnstøðunevndin stig til at gera eina størri kanning um javnstøðu í Føroyum. Eftir at javnstøðunevndin hevði vent sær til Almannamálaráðið og Demokratia, kom samstarv í lag partanna millum, og avtala varð gjørd við Fróðskaparsetrið um at standa fyri kanningararbeiðinum í samstarvi við Lóður. Kanningarúrslitini skulu brúkast sum vitanargrundarlag í mun til javnstøðuavbjóðingar í Føroyum í dag, og skal nýggja vitanin nýtast sum samanberligt grundarlag fyri Føroyar í mun til onnur lond. Harumframt kann kanningin endurtakast og samanberast við áður gjørdar kanningar, og harvið lýsa støðuna á javnstøðuøkinum í mun til fortíð og framtíð. Kanningin fevnir um spurningar, sum eru serliga viðkomandi fyri bæði javnstøðunevndina, Demokratia og Almannamálaráðið. Í mai í 2022 varð samstarvssáttmáli millum javnstøðunevndina, Demokratia, Almannamálaráðið og Fróðskaparsetrið undirskrivaður, og síðani varð arbeiðið byrjað. Kanningararbeiðið varð liðugt í november 2022, og eftir ætlan verður almenn framløga á vári í 2023.

## Átøk á sosialum miðlum

Javnstøðunevndin tók í september mánaði stig til átak á sosialum miðlum, sum spurdi menn, hvat javnstøða millum kyn merkir fyri teir. Hetta fyri at eggja monnum til í størri mun at taka lut í javnstøðukjakinum.

Luttakarar vóru:

Tórður Mikkselsen, tíðindafólk
Marnar Fríðheim Kristiansen, lækni og Ph.D.
Kjartan Johansen, hondbóltsleikari
Jóan Pauli Dahl Jakobsen, stjórnmálafrøðingur
Jógvan Fríðriksson, biskupur

Javnstøðunevndin hevur við jøvnum millumbilum deilt sonevndar "javnstøðubitar" á sosialum miðlum, ið eru bitar av kunning um ymisk viðurskifti, ið viðvíkja javnstøðu millum kyn, sum finnast á heimasíðuni www.javnstoda.fo. Evnini, ið ljós hevur verið varpað á í 2022, eru kynsnormar, óbeinleiðis og beinleiðis mismunur, javnrættur og javnstøða, javnstøðuintegrering, lívfrøðiligt kyn og sosialt kyn og pápabarsil.

Harumframt hava verið samrøður við forkvinnuna og skrivaran í fjølmiðlunum, eitt nú í Degi og Viku, Breddanum, Góðan Morgun Føroyar, og á tíðindaportalum um ymisk evni, sum viðvíkja javnstøðu.

### Fólkatingsval og løgtingsval

Bæði fólkatingsval og løgtingsval settu stóra dám á seinnu hálvu av 2022. Fólkatingsval var í Føroyum tann 31. oktober, og nakrar vikur seinni var aftur valstríð í sambandi við løgtingsvalið, sum var tann 8. desember. Í báðum førum var skrivarin javnan í miðlunum og viðmerkti valstríðið í sambandi við kynsspurningar, eitt nú kynsumboðan á uppstillingarlistum og kvinnuluttøku í politikki. Eftir valdagin var skrivarin somuleiðis í miðlunum sum viðmerkjari, eitt nú í sambandi við kynsumboðanina í Føroya løgtingi og Føroya landsstýri.

## 7. Virkisøki og arbeiðssetningur

Javnstøðunevndin er sjálvstøðug nevnd, ið er skipað undir Føroya landsstýri. Javnstøðumálsøkið varð í sambandi við løgtingsvalið í september 2015 flutt úr Vinnumálaráðnum í Almannaráðið at umsita í 2016. Virkisøkið er lógarfest við løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn, hvørs endamál er at beina burtur allan mismun vegna kyn.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini er:

- at hava eftirlit við, at lógin um javnstøðu verður hildin, og at viðgera kærur frá fólki, sum halda seg hava verið fyri mismuni vegna kyn, § 9 og § 11, stk. 1.
- at virka fyri at beina burtur allan mismun vegna kyn innan øll samfelagsøkir og luttaka í samfelagskjakinum við atliti at javnstøðuspurningum og veita upplýsing grundaða á ta vitan, nevndin í arbeiði sínum fær
- at virka fyri eins møguleikum til útbúgving, arbeiði, yrkisligari og mentanarligari menning, § 1
- at virka sum ráðgevi hjá almennum stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum og at samstarva við aðrar almennar stovnar, sum arbeiða við javnstøðumálum
- at geva tilmæli í javnstøðumálum, § 9
- at geva loyvi til frávik frá lógini viðvíkjandi starvslýsing o.ø., og viðvíkjandi setan av nevndum og ráðum, § 3 stk. 2 og § 8, stk. 2, umframt
- at kunna um javnstøðulógina og -nevndina. Harumframt er nevndin kærumyndugleiki í løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki.

Harumframt er nevndin kærumyndugleiki í løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki.

## 8. Nevndarlimirnir

Javnstøðunevndin verður vald beint eftir løgtingsval og situr valskeiðið, ið løgtingið situr. Limir kunnu endurveljast. Eftir lógini velur avvarðandi landsstýrisfólk eina formann ella forkvinnu og tilnevnir eftir tilmæli frá feløgum og stovnum fýra aðrar limir, sum umboða

- Arbeiðsgevarar
- Løntakarar
- Kvinnufelagasamskipan Føroya
- Skúla-, heilsu- og almannaverkið

Sitandi javnstøðunevnd varð í januar 2020 tilnevnd av landsstýriskvinnuni í javnstøðumálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur.

**Limirnir í javnstøðunevndini eru:**

- Mai Laksáfoss Simonsen, forkvinna, umboð fyri Føroya landsstýri
- Annfinnur Garðalíð, umboð fyri løntakarar
- Niels Winther, umboð fyri arbeiðsgevarar
- Helena Fríðheim, umboð fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya
- Hedvig Johansdóttir, umboð fyri skúla-, heilsu- og almannaverkið

**Varaumboðini eru:**

- Jón Harald Poulsen, næstformaður, varaumboð fyri Føroya landsstýri
- Mary Antonsdóttir, varaumboð fyri løntakarar
- Jórun Gardar, varaumboð fyri arbeiðsgevarar
- Leif Olsen, varaumboð fyri skúla-, heilsu- og almannaverk
- Annetta Saltá, varaumboð fyri Kvinnufelagssamskipan Føroya

Í 2021 hava Niels Winther, Hedvig Johansdóttir og Annfinnur Garðalíð verið í farloyvi, og tí hava varaumboðini Mary Antonsdóttir, Jórun Gardar og Leif Olsen tikið sæti fyri tey. Í 2022 kunngjørdi Annfinnur Garðalíð, at hann tók sæti aftur í javnstøðunevndini. Hedvig Johansdóttir kunnaði eisini nevndina um, at hon segði nevndarsessin endaliga frá sær, og tí helt Leif Olsen fram sum fastur limur restina av árinum 2022.

Tann 2. mai 2022 tók Brandur Mortensen Nolsøe við sum nýggjur skrivari og samskipari.

# 9. Játtan

Javnstøðunevndin er á løgtingsins fíggjarlóg, og hendan játtanin er tað, sum javnstøðunevndin hevur at virka fyri. Í fíggjarlógini fyri 2019 vórðu játtaninar til Javnstøðunevndina og Demokratia lagdar saman og harumframt vórðu 250.000 kr lagdar afturat. Tá fíggjarlógin fyri 2022 bleiv samtykt, eydnaðist tað landsstýriskvinnu Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur at fáa 200.000 krónur á játtanina, soleiðis at tað loksins fer at gerast møguligt at hava ein fulltíðarsettan akademiskan skrivara / samskipara á skrivstovuni. Seinastu fimm árini hava játtanirnar til javnstøðunevndina verið:

- 2022: 880.000 kr.
- 2021: 700.000 kr.
- 2020: 686.000 kr.
- 2019: 635.000 kr.
- 2018: 419.000 kr.

Savnaða játtanin til javnstøðumál í 2022 var 1.277.000 kr. markaðar soleiðis:

- 397.000 til Kvinnuluttøku í politikki (Demokratia)
- 880.000 til Javnstøðunevndina